Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

# Frasier

Á TvDanmark í kvøld kl. 19.25



*Niles og Daphne Moon gleða seg í hesum síðsta partinum*

TvDanmark sendir síðsta partin í skemtirøðini Frasier. Sendirøðin hevur verið væl móttikin og hevur 11. sesongir á baki. Dr. Frasier Crane byrjaði sum fastur gestur á Sam´s Bar. Leikluturin "Frasier" í hesi sendirøðini varð so væl móttikin, at "Frasier" bleiv heitið á eini nýggjari skemtirøð við sama persóni í høvuðsleiklutinum, sum sálarfrøðing á eini útvarpsrás í Seattle. Kelsey Grammer er maðurin aftan fyri tann snobbuta sálarfrøðingin Frasier. David Hyde Pierce er í leiklutinum sum Niles, yngri bróðir og starvsbróðir hjá Frasier. Hóast teir báðir eru brøður, so eru teir støðugt í stríði um at verða tann mest populeri sálarfrøðingurin í býnum - og Niles er ikki minni snobbur enn eldri beiggin. Aðrir persónar, ið ofta eru at síggja í skemtirøðini er tann jarðbundni Martin, ið løgið nokk er pápi at snobbunum báðum. Daphne Moon er gjøgnum fleiri ár stóri kærleikin hjá Niles, nú er hon endiliga blivin kona hansara. Síðst, men ikki minst er lítli hundurin hjá Martin, Eddie, ið Frasier ikki tolir sýnið á. Sjónvarpshølini hjá Paramount steðga við Frasier, meðan leikur er góður. Røðin hevur vunnið fleiri Golden Globe- og Emmy-virðislønir. Óiva fer TvDanmark at gera meiri burturúr Frasier og endursenda gamlar partar. Síðsti parturin kallast "Goodbye, Seattle".



*TvDanmark sendir síðsta partin í skemtirøðini Frasier við heitinum "Goodbye, Seattle"*

# Spider-Man

Á Tv3 leygarkvøldið kl. 20.00



*Hetjan Spider-Man*



*Tobey Maguire í leiklutinum sum studenturin, ið verður bitin av einum eiturkoppi*

Ein av teimum best umtóktu teknirøðunum nakrantíð er komin á løriftið og nú eisini á sjónvarpsskíggjan. Filmurin kom út á 40 ára-degnum fyri tí fyrstu útgávuni av teknirøðini. Studenturin Peter Parker (Tobey Maguire) verður bitin av einum genmanipuleraðum eiturkoppi - hetta bitið broytir lív hansara fullkomiliga. Brádliga er hann førur fyri at klatra upp eftir húsaveggjum, uttan stórvegis trupulleikar - eins og ein eiturkoppur. Og so fær hann eisini, sum hóskar seg eini rættari teknirøðshetju, eina ótrúliga superstyrki. Men snildir, svikafullir fíggindar gera um seg og fáa eyga á unga eiturkoppamannin. Tann stóri fíggindin er vísindamaðurin og handilsmaðurin Norman Osborn (Willem Dafoe), ið eisini fær óvanliga nógva styrki...



FILMSTEIGURIN

# Alexander



Heimurin, soleiðis sum vit kenna hann, hevði ikki verið tann sami, var tað ikki fyri hansara blóðugu kríggj. Krígsmaðurin, kongurin, elskarin, hersetarin Alexander tann stóri av Makedonia, er uttan iva ein av heilt stóru legendunum í alheims søguni.

Fimurin lýsir blóðugu innrás hansara í Persia, Egyptalandi og India. Her megnaði hann upp á einans átta ár at savna sær eitt risastórt keisaraveldi. Nakað sum tó eisini ber við sær, at hann at enda fellur av tindunum og doyr. Bara 32 ára gamal.

Tað er Oliver Stone, sum hevur leikstjórnað filminum, og sum vant, so er dramatikkur, søguligur nærleiki og framúr leikmyndir partur av spælinum, tá hann er við.

Og sum um tað ikki var nóg mikið, so síggja vit eisini fleiri av tiemum heilt stóru filmssjónleikarunum í action. Eitt nú Angelina Jolie, Val Kilmer og Anthony Hopkins. Høvuðsleiklutin sum Alexander hevur írski Colin Farrel






**Frumsýning – Billettprísur: 85,- kr.**
Fríggjadagin 26.11. kl. $22^{00}$ Leygardagin 27.11. kl. $22^{00}$
Sunnudagin 28.11. kl. $21^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 26.11. kl. $19^{45}$ Fríggjadagin 19.11. kl. $23^{00}$
Leygardagin 27.11. kl. $19^{45}$ Leygardagin 27.11. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 28.11. kl. $19^{00}$ Sunnudagin 28.11. kl. $22^{00}$




Fríggjadagin 26.11. kl. $20^{30}$ Leygardagin 27.11. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 28.11. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 26.11. kl. $17^{15}$ Leygardagin 27.11. kl. $16^{30}$
Sunnudagin 28.11. kl. $16^{30}$

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning Fríggjadagin 03.12. – Billettprísur: 55,- kr.**




**Frumsýning Fríggjadagin 03.12.**